# HOFF STOFF

Bú- og starvsfólk á Tjarnargarði:

# Vit gleða okkum

**Meðan tey eru í Havnini, skulu dronning Margretha og Prins Henrik millum annað á vitjan á Tjarnargarði, sum er nýggjasta ellisheimið í Havnini. Og har eru øll sera spent til vitjanina**

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*– Vit fyrireika okkum sera væl, tí vit fáa jú fína vitjan. Og vit eru øll øgiliga spent, sigur Jórun Jákupsdóttir, ið er varaleiðari á Tjarnargarði*

– Vit hava gjørt eina skrá fyri tann hálva tíman, sum kongshjúnini vera her, og borgarstjórin hevur júst góðkent hana, so jú, man kann gott siga, at vit hava fyrireikað okkum væl til vitjanina, sigur Jórun Jákupsdóttir, ið er varaleiðari á Tjarnargarði.

## Sendu innbjóðing

Jórun greiðir frá, at so skjótt tey frættu, at tey kongaligu fóru at koma til Føroya í summar, sendu tey eitt bræv til ríkisumboðið og bjóðaðu teimum kongaligu niðan at vitja.

– Men vit høvdu hóast alt ikki væntað, at tey fóru at taka av, so tað kom sum eitt stórt yvirraskilsi, tá vit fingu at vita, at tey fegin vildu koma, greiðir Jórun frá.

Hon sigur, at tey síðani hava hugsað um, hvussu vitjanin skuldi skipast, og nú eru allir brikkarnir um at fella uppá pláss.

– Tey steðga bert ein hálvan tíma, so tað má skipast væl, vísir Jórun á.

Fyrst koma drotningin og prinsurin inn á búðdeildina, har øll búfólkini sita inni í felagsrúminum, klár at taka í hond og heilsa uppá. Møguliga fer onkur teirra at siga nøkur orð. Har verður steðgað í 10 min.

Síðani verður farið yvir á dagdeildina, har tey serliga fara at steðga inni í sansirúminum, sum er eitt nýtt rúm fyri minnisveik, ið setir sansirnar í gongd við tónleiki, ljóði og einum massagustóli. Á dagdeildini fer Karl Hansen, sum plagar at vera á dagdeildini, at lesa eina yrking upp. Her verður eisini steðga í 10 min.

At enda verður farið inn í fysioterapirúmið, har okkurt lætt ábit verður at fáa. Her eru somuleiðis 10 min. settir av, og so fer regentparið víðari.

## Tey gomlu eru spent

Spurd, um tey gomlu vita hvat skal henda, svarar Jórun, at tað gera tey væl.

– Vit merkja týðiliga, hvussu spent tey eru, og tey vita væl hvat skal henda, staðfestir Jórun.

Hon sigur, at tey kongaligu veruliga er nakað, sum tey eldru hava áhuga fyri.

– Tað vísir seg, at tað altíð er gott at tosa við tey eldru um tey kongaligu. Eisini eftir, at tey eru byrjað at gerast gloymsk og ikki longur minnast so væl. Um tey einki annað vita at práta um, so kann man altíð nevna okkurt um kongshúsið, tí tað gevur bonus hvørjaferð, sigur Jórun smílandi.

Hon sigur, at øll eru spent at hitta drotningina. Men summi gleða seg tó meiri enn onnur.

– Ein kona á dagdeildini hevur einaferð havt vitjan av drotning Ingrid. Tey búðu í Vestmanna tá Ingrid og Frederik komaa vitjan har. Sambandið var ikki so gott tá, at man slapp fram og aftur, sum í dag. So drotning Ingrid og Frederik prinsur fóru inn til hesa konuna at snollað seg eitt sindur. Hon er tískil eisini ógvuliga spent at síggja Margrethu nú, greiðir Jórun frá.

Hon sigur, at øll fara at pynta seg og gera eitt sindur eyka burturúr. Tey, sum hava frí tann dagin, ætla sær øll at koma framvið allíkavæl.

– Tað er ikki hvønn dag, at man sær so fína vitjan, sigur Jórun at enda.

Tá kongsparið kemur, hevur Jórun ábyrgdina av at fylgjast við Hendriki prinsi.

Esmar Jacobsen á Tjarnargarði:

# – Øll hugsa um vitjanina

**Eitt av búfólkunum á Tjarnargarði er Esmar Jacobsen úr Gøtu. Hann heldur, at hóast tey ikki tosa so nógv um tað sínamillum, so er drotningavitjanin nakað, sum øll búfólkini hugsa um**

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Jú, eitt sindur spentur at hitta drotningina, tað eri eg, svarar Esmar Jacobsen, tá hann verður spurdur um hann gleðir seg til kongaligu vitjanina.

– Eg havi sæð hana einaferð fyrr. Tað var tá Ingrid og Frederik vóru her á vitjan og prinsessurnar vóru smágentur, greiðir Esmar frá.

Esmar heldur, at tað er gott, at tey kongaligu royna at koma út at vitja fólk.

– Tað er so sjáldan, at tey hava tíð at koma á vitjan, so tað er gott, sigur hann.

Og Esmar ætlar at pynta seg til vitjanina.

- p 5Tá drotningin kemur at heilsa uppá, má man royna at vera so toliligur, heldur hann.



# Nógv útlendsk pressa

**Kongaliga húskið kemur ikki einsamalt til landið í komandi viku. Eitt herðlið við millum 45 og 50 útlendskum tíðindafólkum hevur nevniliga eisini biðið um innivist**

HOFF-STOFF
*eydna@sosialurin.fo*

Tað eru serliga donsku fjølmiðlarnir, ið hava hug at fylgja teimum royalu. Talið av útlendskum tíðindafólkum táttar hesuferð í tey fimmti,og tað er eitt óvanliga høgt tal. Til samanberingar kann nevnast, at seinastu ferð kongshjúnini vitjaðu, vóru bara 12 útlendsk miðlafólk við.

## Eitt blandað lið

Um tað er Mary krúnprinsessa, ið serliga hevur stóra áhugan hjá miðlunum, er óvist, men staðfestast kann í øllum førum, at tað ikki bert er sonevnda »kulørta pressan«, ið hevur teknað seg til túrin. »Billed Bladet«, »Her og Nu« og »Se og Hør« koma øll til landið sunnudagin, men eisini seriøsari miðlar, sum »Jyllandsposturin«, »Berlingske«, »TV2« og »Danmarks Radio« hava eisini biðið um innivist.

Umframt stóra danska áhugan, er eisini áhugi fyri Føroyavitjanini í Týsklandi, haðani ein týsk sjónvarpsstøð kemur.

Umframt útlendsku miðlarnar, verða sjálvandi eisini nógv umboð fyri føroysku pressuna við á ferðini hjá teimum kongaligu, og løgmansskrivstovan hevur givið lyfti um, at føroysku miðlarnir eiga helvtina av plássunum, sum eru sett av til fjølmiðlar.

Hvussu er og ikki, so er eingin ivi um, at Føroyar veruliga verða settar á dagsskránna í kongaríkinum, teir dagarnar, kongaligu gestirnir eru her.